# Býráðið

**Dagfesting:** 15.12.2022 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 41/22 | 22/00586-1 | Tilmæli um heimild at undirskriva skjøl viðvíkjandi keyp og sølu av fastari ogn |
| 42/22 | 22/00585-4 | Uppskot til býráðs og nevndarfundir 2023 - býráðið |
| 43/22 | 22/00576-5 | Umsókn frá eigaranum av matr. nr. 143bm um at keypa matr. nr. 143h - Íbúðarbygging á matr. nr. 143bm og 143h |
| **Til kunning** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til støðutakan**

## 41/22
## 22/00586-1 Tilmæli um heimild at undirskriva skjøl viðvíkjandi keyp og sølu av fastari ogn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 15.12.2022 | 41/22 |



## Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Fuglafjarðar býráðið | | |
| Stutt lýsing av málinum | Sambært kommunustýrislógini § 44, stk. 2 skulu skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess. Í hesum førinum kann Fuglafjarðar býráð geva kommunustjóra, Jóanis Erik Køtlum, hesa heimild | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Málið verður viðgjørt við tí endamáli at fáa formligu heimildina, í samband við keyp og sølu af fastari ogn o.t., hjá nýggja kommunustjóranum uppá pláss. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Kommunustýrislógin | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til at geva kommunustjóranum hesa heimild. | | |
| Dagf | 12. desember 2022 | | |

**Býráðið 15. december 2022:**
Býráðið tekur einmælt tilmælinum frá borgarstjóranum.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 42/22
## 22/00585-4 Uppskot til býráðs og nevndarfundir 2023 - býráðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 15.12.2022 | 42/22 |

## Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
| Stutt lýsing av málinum | Nevndirnar skulu á seinasta fundi í árinum leggja ætlan fyri fundirnar komandi ár. Býráðið skal leggja ætlan fyri býráðsfundirnar.<br><br>Hjálagt er eitt uppskot til, nær fundirnir fyri 2023 skulu haldast. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Uppskot til býráðs- og nevndarfundir 2023 | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Uppskot til býráðs- og nevndarfundir 2023 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Mælt verður til, at býráðið tekur støðu til uppskotið til býráðsfundirnar fyri 2023. | | |
| Dagf | 13-12-2022 | | |



**Býráðið 15. december 2022:**

Býráðið tók avgerð um, at áseta býráðsfundirnar sambært talvuni niðanfyri.

| 2023 | Jan. | Feb. | Mar. | Apr. | Maj. | Jun. | Jul. | Aug. | Sep. | Okt. | Nov. | Des. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Býráðsfundir** Kl. 19.00 | 26. | 23. | 29. | 27. | 25. | 19. | Feria | 31. | 28. | 26. | 29. | 14. |

**43/22**
**22/00576-5 Umsókn frá eigaranum av matr. nr. 143bm um at keypa matr. nr. 143h - Íbúðarbygging á matr. nr. 143bm og 143h**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.12.2022 | 90/22 |
| 2 Býráðið | 15.12.2022 | 43/22 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar kommuna hevur fingið umsókn frá eigaranum av matr. nr. 143bm, um at fáa loyvi til at keypa matr. nr. 143h frá kommununi.<br>Ætlanin er at brúka grundstykkini til íbúðarbygging, har ein íbúðarblokkur á fýra íbúðareindir kemur at standa á matr. nr. 143bm, og ein íbúðarblokkur á somuleiðis fýra íbúðareindir kemur at standa á matr. nr. 143h.<br>Matr. nr. 143bm er 575 fermetrar til støddar, og matr. nr. 143h er 785 fermetrar til støddar.<br><br>Tekniska deild hevur havf fund við umsøkjaran 9. desember, har hann greiddi frá ætlanini. Ætlanin er at brúka somu tekning til hesa verkætlanina, sum varð ætlað til Bøveg. Íbúðarblokkarnir verða staðsettir yvir ímóti landsynningsunnan markinum av matr. nr. 143bm, og yvir ímóti útnyrðingnorðan markinum av matr. nr. 143h, tó við eini frástøðu frá markinum á 2,5 m.<br>Ætlanin er at hava parkering og fríøki ímillum íbúðarblokkarnar.<br><br>**Støðulýsing av matriklum**:<br>**Matr. nr. 143bm**<br>Grundstykkið er partvíst útgrivið, og verandi hæddarmunurin millum veg og planeraða grundstykkið er stórur.<br><br>**Matr. nr. 143h**<br>Grundstykkið er óútgrivið. Ein á gongur oman ígjøgnum grundstykkið, sum fer í eitt regnvatnsrør og oman undir Sevdalsvegin, sum keyparin kemur at rinda fyri.<br><br>**Viðmerkingarnar frá teknisku deild eru hesar**<br>Mælt verður til at flyta markið millum matr. nr. 143bm og 143h í ein útnyrðingnorðan, soleiðis at grundstykkini koma at verða líka stór, umleið 680 fermetrar.<br>Eisini er neyðugt at leggja ánna í eitt regnvantsrør, og gera eitt inntak omanfyri matr. nr. 143h. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fyri at fáa eina góða atgongd til økini, so verður mælt tll at lækka verandi planering umleið 1 metur, hetta fyri at fáa eina góða atkomu til bæði grundstykkini. Eisini er neyðugt hjá umsøkjaranum at gera eina verkætlan av vegaatkomuni til bæði grundstykkini við longdarskurði og tværskurði.<br><br>Matr. nr. 143h er ikki byggilendi eftir galdandi byggisamtykt. Her er neyðugt at broyta verandi byggisamtykt frá haga, merkt I til økið B. Eisini verður mælt til at gera eina serstaka byggisamtykt fyri grundstykkini, matr. nr. 143bm og 143h, soleiðis at íbúðarbyggingin verður gjørd soleiðis, at hon klæðir seg til umhvørvið og til verandi bygningar á staðnum.<br><br>**Ískoyti til fundin í býráðnum 15. desember 2022**<br>Málið hevur verið fyri í teknisku nevnd 14. desember. Býráðið skal taka støðu til at broyta part av matr. nr. 143bm frá øki I til B, og at gera eina serstaka byggisamtykt til íbúðarbygging á matr. nr. 143bm og 143h, Fuglafjørður. Víst verður til byggisamtyktarkort, sí FK j. nr. 22/00576-7. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Skapa karmar fyri at fáa fleiri fólk til Fuglafjarðar kommunu. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Verandi byggisamtykt og BK 17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 22/00576-1 Umsókn um loyvi til at keypa matr. nr. 143h<br>FK j. nr. 22/00576-7 Byggisamtyktarkort | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at ganga umsóknini á møti um at keypa matr. nr. 143h frá Fuglafjarðar kommunu, og at gera eina serstaka byggisamtykt til íbúðarbygging á matr. nr. 143bm og 143h, har hon verður løgd út til almenna hoyring og eftirlits, og at málið fer frá teknisku nevnd í býráðið til góðkenningar.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 15. desember 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir býráðnum til at taka undir við at broyta part av økinum, matr. nr. 143bm, frá øki I til økið B, og at gera eina serstaka byggisamtykt til íbúðarbygging á matr. nr. 143bm og 143h. | | |
| Dagf | 13. desember 2022. | | |

**Tekniska nevnd 13. december 2022:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og broyta part av matr. nr. 143h frá øki I til økið B.

**Býráðið 15. december 2022:**
Býráðið tók einmælt undir við, at broyta part av økinum, matr. nr. 143bm, frá øki I til økið B, og at gera eina serstaka byggisamtykt til íbúðarbygging á matr. nr. 143bm og 143h.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 20.00

______________________________
Dávur Juul

______________________________
Eyðun á Lakjuni

______________________________
Sonni á Horni

______________________________
David Andreasen

______________________________
Edva Jacobsen

______________________________
Eivin Breiðaskarð

______________________________
Gudny Vang

______________________________
Magni Jøkladal

______________________________
Ólavur Larsen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo